## Øssur Kjølbro boðanarleiðari

Tað verður Øssur Kjølbro, Klaksvík, sum frá 1. januar 2007 fer at virka sum nýggjur deildarleiðari á boðanardeildini hjá Heimamissiónini.

Hann verður leiðari fyri 11 starvsfólkum, trúboðarum úti og heima, barna- og ungdómsráðgevunum eins og staðbundnu skrivarunum. Hetta starv er ein liður í nýggja starvsfólkabygnaðin hjá Heimamissiónini, sum eftir ætlan fer at virka frá 1. januar 2007.

Bygnaðurin hevur við sær, at starvsfólkini fara at arbeiða í tveimum deildum, boðanardeildini og samskiftisdeildini. Øssur Kjølbro verður leiðari á boðanardeildini, meðan fíggjarleiðarin, Jørmund Foldbo verður deildarleiðari á samskiftisdeildini.

*Kelda: www.mission.fo*



## Minni royking hjálpir lítið

Sambært eini nýggjari norskari kanning eru at kalla eingir fyrimunir við at skerja talið av sigarettum, sum verða guvaðar um dagin. Í kanningini hava granskarar fylgt 51.000 kvinnum og monnum í 20 ár, og niðurstøðan tykist vera púrasta greið. Skulu roykjarar vinna sær nakrar heilsuligar fyrimunir, eiga hesi at leggja púrasta av. Sjálvt ein stór skerjing av tubbaksnýtsluni yvir eitt longri áramál hevur púrasta ongar fyrimunir sammett við eina áhaldandi stóra nýtslu av tubbakki. Hinvegin er heldur eingin ivi um, at eitt roykistopp gevur fleiri og stórar heilsuligar fyrimunir.

# 2006 helst betri ár hjá flotanum



*– Hóast greiningin ikki fevnir um árið í ár, síggja vit ábendingar um, at 2006 verður betur enn 2005 hjá flestu skipabólkum, sigur Bjarni Poulsen, sum á fundi í gjár legði fram eina roknskapargreining yvir føroyska fiskiskipaflotan árini 2001-2005*

**- Skipini hava sum heild havt nøkur vánalig ár seinastu árini, men nú hevur flotin aftur framgongd, og hetta sæst eisini aftur í búskapinum. Ábendingar eru um, at árið í ár fer at roynast betur enn árið í fjør. Samlaða veiðinøgdin er økt, og tað eru fiskaprísirnir eisini, sigur Bjarni Poulsen í roknskapargreining, sum Rasmussen & Weihe hava gjørt**

FISKIFLOTIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*myndir: Vilmund Jacobsen*

Í gjár skipaði Rasmussen & Weihe fyri árligu framløguni um støðuna í føroysku fiskivinnuni. Í framløguni verður dentur lagdur á støðuna hjá føroyska fiskiskipaflotanum, men grannskoðarafyritøkan ger eisini eina greining yvir gongdina í føroysku fiskavirkisvinnuni.

Hesin árligi fundurin er ætlaður viðskiftafólkum hjá felagnum, og vanliga er tað serliga tann parturin av viðskiftafólkunum, sum virka í fiskivinnuni, ið eru við til framløguna.

Rasmussen & Weihe hava gjørt eina roknskapargreining av fiskiskipaflotanum fyri árini 2001-2005, og við framløguna verður í stuttum eisini mett um árið, sum skjótt er umliðið.

Grundarlagið undir greiningini er í fyrsta lagi almennu ársroknskapirnir, men felagið hevur eisini kannað sær aðrar upplýsingar, eitt nú um veiðinøgd og nettosølu, og í hesum sambandi er tað ikki minst Føroya Fiskimannafelag, sum situr á góðum og neyvum hagtølum um fiskiskipaflotan.

### Hvør bólkur sær

Greiningin er býtt upp í tilsamans 9 bólkar, 1) Allur flotin, 2) Pelagisk vinna, 3) Rækjuvinna, 4) Verksmiðjutrolarar, 5) Partrolarar, 6) Lemmatrolarar, 7) Línuskip, 8) Garnaskip og 9) Onnur skip.

Soleiðis fevnir greiningin um meginpartin av fiskiskipaflotanum.

Útróðrarflotin er ikki tikin við, tí har eru bert fáir bátar, ið eru skipaðir í partafelag ella smápartafelag við skyldu at lata inn almennan roknskap.

Tað var Bjarni Poulsen, sum vegna Rasmussen & Weihe hevði framløguna í gjár, og honum til hjálpar vóru eitt nú Niclas Joensen og Jacobina í Lambanum, sum sat við telduna.

– Í greiningini hava vit lagt dent á at vísa á gongdina hjá hvørjum einstøkum skipabólki hesi 5 árini, og fyri at fáa eina heildarmynd av fiskiskipavinnuni, hava vit somuleiðis valt at leggja saman tølini fyri allar skipabólkarnar, sigur Bjarni Poulsen.

### Egnar niðurstøður

Taltilfarið, sum er grundarlagið undir greiningini, er rættiliga rúgvusmikið, og ætlanin hjá Rasmussen & Weihe er, at greiningin skal geva lesaranum møguleika fyri at gera sínar egnu niðurstøður.

–Taltilfarið er rúgvusmikið og kann greinast á ymiskar hættir, leggur Bjari dent á.

Í stuttum kann sigast, at stórar broytingar eru farnar fram í tíðini 2001-2005.

– Sum heild, hevur fiskiflotin havt eina stóra afturgongd árini 2001-2004, men henda afturgongd vendi í 2005 aftur til eina framgongd. Tó er samlaða úrslitið í 2005 heili 82,4% lægri enn í 2001, sum annars var eitt sera gott ár hjá fiskiflotanum.

Bjarni vísir á, at afturgongdin í hjá fiskiskipaflotanum – og fiskavirkisvinnuni, er høvuðsorsøkin til, at støðuga framgongdin, sum var í føroyska búskapinum árini frammanundan, vendist til eina afturgongd.

– Men nú hevur fiskiskipaflotin aftur framgongd, og hetta sæst eisini aftur í búskapinum, sigur hann.

### Positiv gongd

Roknskapargreiningin hjá Rasmussen & Weihe fevnir sum nevnt ikki um árið 2006, sum enn ikki er umliðið.

– Men vit síggja ábendingar um, at árið 2006 verður betur enn 2005 hjá flestu skipabólkum.

Bjarni Poulsen vísir til tøl hjá Føroya Fiskimannafelag, sum siga, at samlaða veiðinøgdin í tíðarskeiðinum januar-september 2006 er økt við umleið 12% samanborið við sama tíðarskeið í 2005.

– Haraftrat kemur, at miðalprísurin er øktur nakað í sama tíðarskeiði.

Hann sigur, at samlaða veiðivirði sambært hagtølunum er økt sløk 32% fyrstu 9 mánaðirnar í ár samanborið við somu tíð í fjør.

– Ábendingar um hækkandi fiskaprísir og betri



*- Pelagisku skipini høvdu eitt framúr gott ár í 2001, men árini eftir gekst ikki so væl. Í 2005 gekk aftur framá, og í árið í ár verður væntandi uppaftur betri enn 2005, sigur Bjarni Poulsen*